Álit

í

løgtingsmáli nr. 92/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroya (Leingjan av tíðarskeiðnum, ið ferðandi skulu rinda avgjald við komu til Føroya)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 25. februar 2021 og eftir 1. viðgerð 3. mars 2021, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 8. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýrismannin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen.

Ein samd nevnd vil vísa á, at við uppskotinum verður tíðarskeiðið, ferðandi skulu rinda eitt avgjald á kr. 312,00 við komu til Føroya longt frá 1. apríl 2021 til og við 31. desember 2021. Broytingin er grundað á, at kravið um at lata seg kanna við komu til Føroya stendur við.

Farsóttin varð staðfest í Føroyum í mars mánaði 2020 og í hesum sambandi vórðu ymsar fyriskipanir settar í verk, eins og fólk vórðu sett í sóttarhald. Farsóttarnevndin hevur álagt øllum, sum koma til Føroya, at lata seg kanna fyri COVID-19. Øll ferðandi til Føroya eru tí síðani 27. juni 2020 kannað fyri COVID-19.

Avgjaldsupphæddin á kr. 312,00 avspeglar kostnaðin hjá landinum uttan meirvirðisgjald fyri at fólk verða kannað fyri COVID-19.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur sent nevndini uppskot um tvær broytingar í lógaruppskotinum. Onnur broytingin er lógarteknisk, har man nágreinar í lógartekstinum, at tað er 1. oktober 2020 sipað verður til í § 1, nr. 1, fyri at eingin ivi skal vera um, at heimild er at uppkrevja avgjald við komu til Føroya árið út. Hin broytingin er, at løgtingslógin verður sett úr gildi 1. apríl 2022 ístaðin fyri 1. januar 2022 fyri at geva TAKS longri skotbrá at innheinta møguligar eftirstøður við panting.

Nevndin tekur undir við hesum, men mælir hinvegin til at stytta uppskotna avgjaldstíðarskeiðið til at enda 1. september 2021 heldur enn 31. desember 2021.

Nevndin setir tí fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 1 verður "1. oktober til og við 31. desember 2021" broytt til: "1. oktober 2020 til og við 31. august 2021".
2. Í § 1, nr. 2 verður "og fer úr gildi 1. januar 2022" broytt til: "og fer úr gildi 1. apríl 2022".

Viðmerkingar:

Til nr. 1:

Umframt at nágreina í lógartekstinum, at tað er 1. oktober 2020 sipað verður til í § 1, nr. 1, verður avgjaldstíðarskeiðið stytt til at enda 1. september 2021 í mun til uppskotið frá landsstýrismanninum, sum var árið út.

Til nr. 2:

Løgtingslógin verður sett úr gildi 1. apríl 2022 ístaðin fyri 1. januar 2022 fyri at geva TAKS longri skotbrá at innheinta møguligar eftirstøður við panting.

Við hesum viðmerkingum og broyting tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. mars 2021

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Páll á Reynatúgvu
	Ruth Vang	